


# Statoil fleiri boringar í Barentshavinum

Deil:



**Jan Müller**

13.07.2014 - 10:28

Oljan.fo

Norska oljufelagið heldur fram við royndum sínum at finna olju og gass har norðuri í Barentshavinum.

Hóast tað var turt í Apollo brunninum har norðuri í Barentshavinum fyrr í summar, so heldur Statoil fram við síni borikampanju í tí sokallaða Hoopøkinum í Barentshavinum.

Statoil fer í næstum at bora Mercury leitimiðið nakað sunnan fyri Apollo økið, har Atlantis brunnurin verður boraður í løtuni, umleið 242 kilometrar norðan fyri Nordkapp í Norðurnorra.

Statoil brúkar boripallin Tansocean Spitsbergen til boringina. Eftir ta boringina fer pallurin longur suður til Pingvin leitimiðið at bora. Statoil hevur 60% av brunninum, meðan Idemitsu hevur 40%.